# Regnið spældi við Boys In A Band


*Boys In A Band kendu seg væl á pallinum í Roskilde*
*mynd: Niels Uni Dam*

**Síðan nógva regnið hóskvøldið hevði tað verið turt í Roskilde, heilt til Boys In A Band høvdu spælt hálvt annað lag. Tá fór at oysregna, og regnið hevði við sær, at teltið fyltist við krokandi gestum**

ROSKILDE FESTIVAL
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Boys In A Band megnaði leygardagin nakað, ið heilt fáir føroyingar hava gjørt áður, at sleppa á almennu skránna fyri Roskilde Festivalin, og spæla á sjálvum festivalinum, í mun til juniorpallin. Har fleiri føroysk nøvn hava verið at sæð seinastu árini. Fyri limirnar í bólkinum var hetta ein dreymur, ið gjørdist veruleiki. Ljómborðsleikarin Heri Schwartz Jacobsen, greiddi okkum eftir framførsluna frá, at allir limirnir áður høvdu vitjað festivalin, og at tað kendist ótrúliga gott at standa á pallinum her. Hetta var sangarin Pætur Zachariassen samdur í:

- Eg haldi ongantíð áður, at eg havi uppliva so góðan energi frá fólki, sum her. Hatta var ótrúliga feitt, segði Pætur millum eina autograf og ein muss, tí karismatiski sangarin var ein nógv umbiðin maður serliga millum kvinnuligu festivalgestirnar eftir konsertina.

## Regnið rak fólk á konsert

Boys In A Bandhøvdu savnað eitt sindur av fólki í Pavillion teltinum, har bólkurin spældi, tá teir fóru á pall klokkan 16 leygardagin. Rættiliga fitt av fólkinum vóru føroyingar, men eisini onnur vóru komin at hoyra bólkin, sum hevur verið rættiliga jaliga umrøddur í donskum miðlum eftir framførsluna á Atlantic Music Event í vár. Men bólkurin hevði ikki spælt leingi, tá tað fór at oysregna, festivalgestirnir, sum á tí nú rættiliga turra festivaløkinum høvdu latið regnklæðini ligið eftir í teltinum skundaðu sær inn undir teltdúkarnar við pallarnar, tí fyltist telti rættiliga nógv, og Boys In A Band spældu knappliga fyri eini stórari mannfjøld.


*Beint eftir, at Boys In A Band vóru farnir á pallin byrjaði tað at regna*
*mynd: Niels Uni Dam*

## Vunnu nýggjar fjepparar

Tað eydnaðist rættiliga væl bólkinum, at fáa lív í fólkið, og at døma eftir stóru bíðirøðunum at fáa autografir, keypa demofløgur, t-troyggur, langar undirbuksur ella gummistivlar, alt við Boys In A Band prentaðum á sær, so vann eysturoyarbólkurin sær nógvar nýggjar fjepparar á festivalinum.

Konsertin var sum heild góð, hóast bólkurin onkuntíð hevur spælt betur, og serliga sangarin Pætur Zachariassen tyktist eitt sindur hásur í støðum. Tann vanliga orkan var tó har, og hetta er so týdningarmikil partur av teirra úttrykki. Fólk var rættiliga væl við, og ein ung donsk genta, ið var komin inn úr regninum stóð við stórum eygum og spurdi, hvør hatta var, sum spældi, áðrenn hon og vinkonan runnu fram ímóti pallinum.


*Eftir konsertina skrivaðu bólkalimirnir autografir og mussaðu fjepparar*
*mynd: Niels Uni Dam*

## Nýggj spennandi løg

Fleiri nýggj løg vóru á skránni, og boða tey frá, at bólkurin hevur meira uppá seg, enn peppaða Franz Ferdinand rokkin, ið vit kenna teir fyri. Ljóðið kundi verið betur, og tað bleiv tað eisini undir konsertini, tó tyktist ljóðmaðurin dekan ov leitandi í teimum ymisku løgunum, og tað er upp á tíðina, at Boys In A Band fáa sær egnan ljóðmann. Pavillion pallurin er sami pallur, sum varð nýttur til Pavillion Junior, áðrenn festivalskráin alment lat upp, og sostatt sami pallur, sum Høgni Lisberg spældi á mánadagin. Í míni frásøgn av teirri konsertini, fanst eg at, at ljóðið var somikið spakuligt, og hetta var eisini galdandi meðan Boys In A Band spældu, og eg ivist ikki í, at uppaftur betur lív hevði verið í, um decibellini vóru fleiri.